## Petur Mohr skal venja KÍ

Tað verður Petur Mohr, sum fer at standa á odda fyri Vodafone-liðnum hjá KÍ seinastu seks dystirnar av kappingarárinum. Tað váttar Fríðin Ziskason, nevndarformaður í Sp/f KÍ. - Alexander Djordjevic og Jákup Mikkelsen eru framvegis partur av venjaratoyminum, men tað er Petur Mohr, sum nú stendur á odda fyri liðnum, sigur Fríðin Ziskason. Hann leggur afturat, at umskipanin er gjørd í samráð við Alexander Djordjevic og Jákup Mikkelsen, sum hava havt ábyrgdina av liðnum hetta kappingarárið.

KÍ er nummar níggju í kappingini, nú seks dystir eru eftir. KÍ hevur 17 stig, meðan B36, sum er nummar átta, hevur 21 stig.



## Seinastu CL-liðini funnin í kvøld

Seinastu fimm undankappingardystirnir til Champions League í fótbólti verða spældir í kvøld. Á Cypros skal danska FCK verja 1-0 leiðsluna, sum teir hava móti Apoel Nicosia, ið eisini varð liðið, sum sendi EB/Streym úr kappingini. Hinir fýra dystirnir eru Arsenal-Celtic, Stuttgart-Timisoara, Fiorentina-Sporting og Olympiakos-Sheriff Tiraspol.

# Ragnar undir trýsti



Ragnar Isaksen vann um vikuskiftið Tórshavn Open aðru ferð á rað, og longu komandi vikuskifti skal hann royna at verja sítt óalmenna føroyameistaraheiti
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

**– At eg aftur í ár vann Tórshavn Open og um vikuskiftið eisini skal verja óalmenna føroyameistaraheitið í golfi, leggur eitt sindur av trýsti á meg, viðgongur Føroya besti golfspælari í løtuni, Ragnar Isaksen**




Hilmar Jan Hansen

Tað var eitt vónbrot fyri Ragnar Isaksen, at hann ikki var tikin út til føroyska golflandsliðið, sum fyri tveimum mánaðum síðani var við til Oyggjaleikirnar í Álandi. Hann helt seg hava prógvað, at golfspæl hansara var ivaleysa gott til eitt pláss á liðnum, ið annars vísti seg at standa seg sera væl.

Men sum so ofta hjá ítróttarfólkum, ið hava eina vilja av stáli, var bara at spæla uppaftur betur, so eingin skuldi ivast í dygdunum. Og tað gjørdi Ragnar so, tí somu vikuna, sum Oyggjaleikirnir vóru, setti hann nýtt met á golvbreytini á Glyvursnesi við 73 sløgum.

– Eg setti í Tórshavn Open-kappingini í fjør met á Glyvursnesi við 81 sløgum, men Andrias F. Hansen tók herfyri tað metið við 76 sløgum – enntá bara eina viku áðrenn eg sjálvur tók metið aftur við teimum 73 sløgunum, greiðir Ragnar Isaksen frá.

Hann ásannar, at hann fekk ein hvøkk og hálvavegna misti hugin til golf, tá tað stóð honum greitt, at hann ikki slapp til Álands at umboða Føroyar á Oyggjaleikunum. Men tað vardi ikki leingi, so var hann aftur at síggja á Glyvursnesi – og um vikuskiftið staðfesti hann enn eina ferð, at hann man vera Føroya besti golfspælari, tá hann vann Tórshavn Open annað árið á rað.

### Nokk so hart

– Umstøðurnar at spæla vóru sera skiftandi, tí fríggjadagin var rættiliga nógvur vindur, so tá ráddi um at leggja uppfyri, men leygardagin var av allarfagrasta veðri, og tað var næstan sum at spæla í útlondum. Tá lá so mikið væl fyri, at eg var fýra stig framman fyri Janus Norðberg og átta sløg framman fyri Óskar Eiríksson, áðrenn vit komu til síðsta kappingardagin, sigur Ragnar.

– Tí ráddi bara um hjá mær at spæla trygt sunnudagin og avgjørt ikki taka nakrar kjansir. Tað sama gjørdi Janus, sum hesa ferð var tann, ið gav mær mestu kappingina, men allíkavæl eydnaðist mær at økja um munin. Tá vit høvdu verið ígjøgnum tey níggju holini fyrru ferðina sunnudagin, var eg seks sløg frammanfyri, og tá alt var liðugt, var munurin komin upp á sjey sløg.

Ragnar heldur, at serliga teir tríggir – hann, Janus og Óskar – eru so javnir, at tað veruliga ræður um at gera sítt besta, skal tað eydnast at vinna kappingarnar. Og tí er tað ikki sørt, at hann við spenningi sær fram ímóti komandi vikuskifti, tá klubbmeistarakappingin í Tórshavnar Golfklubba er á skránni.

– At eg nú vann Tórshavn Open annað árið á rað og longu um vikuskiftið eisini skal verja óalmenna føroyameistaraheitið, leggur eitt sindur av trýsti á meg. Eg má viðganga, at tað er nokk so hart, sigur Ragnar, sum hevur verið sjúkur í vikuni, men ætlar at gera alt fyri at verða klárur til vikuskiftið.

## Vann Tórshavn Open aftur í ár

**Ragnar Isaksen, sum í fjør fyri fyrstu ferð vann Tórshavn Open-kappingina í golf, endurtók sigurin um vikuskifti, tá spælt var á Glyvursnesi í skiftandi veðri**

GOLF
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Um vikuskiftið var ein av størru føroysku golfkappingunum, Tórshavn Open, á golfbreytini á Glyvursnesi, har spælt var yvir 54 hol í tríggjar dagar, 18 hol hvønn dagin. Fríggjadagin var rættiliga nógvur vindur, leygardagin góðveður og sunnudagin ringt sýni, men tað helt ikki teimum 12 spælarunum aftur.

Tá avtornaði, vann Ragnar Isaksen aftur í ár kappingina, eins og hann gjørdi í fjør. Hann brúkti tilsamans 257 sløg og var bestur allar dagarnar – fríggjadagin við 88 sløgum, leygardagin 83 og sunnudagin 86 sløgum. Par á breytini á Glyvursnesi er 70.

Næstfremstur var Janus Norðberg við 264 sløgum, Óskar Eiriksson var á triðja plássi við 266, og síðani komu Per Poulsen við 280 og Kaj Anthoniussen við 301 sløgum.

Komandi vikuskifti verður klubbmeistarakappingin í Tórshavnar Golfklubba, hvørs vinnari verður roknaður sum óalmennur føroyameistari í golfi.

Hetta er største kappingin á árinum, og eins og í Tórshavn Open, verður kappast á 54 holum í tríggjar dagar: Fríggjadagin frá klokkan 15 og leygardagin og sunnudagin frá klokkan 10.

**FIMM TEIR BESTU Í TÓRSHAVN OPEN**

| Nr. | Spælari | Fríggjad. | Leygard. | Sunnud. | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Ragnar Isaksen | 88 | 83 | 86 | 257 |
| 2 | Janus Norðberg | 89 | 86 | 89 | 264 |
| 3 | Óskar Eiríksson | 90 | 89 | 87 | 266 |
| 4 | Per Poulsen | 96 | 92 | 92 | 280 |
| 5 | Kaj Anthoniussen | 107 | 96 | 98 | 301 |